Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo


## Føðingar



*8. november fekk Robert henda lítla beiggjan, hann eitur Gunnar og er føddur í Korea tann 16. desember 2002. Foreldrini eru Sólvá og Jónsvein Samuelsen, Svínáir.*



*Her siti eg, stóra systir Sofía, undir lítla beiggjanum, sum var føddur 10. nov. Hann vigaði 3450 gr og var 51cm langur. Mamman og pápin eru Annika Joensen og Ólavur Dam Jacobsen í Skopun.*

31. oktober fingu Brian Nýggjagarð og Mathilda Hansen, Hvannasund, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3000 gr.

1. november fingu Birita Kristoffursdóttir Jensen og Jón Sigurd Samuelsen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 4210 gr.

5. november fingu Anja Rein Jacobsen og Ingi Jacobsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3200 gr.

6. november fingu Arngerð Djurhuus og Jón Nielsen, Vágur, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4600 gr.

7. november fingu Eyðleyg og Kári í Garði, Stronum, ein son. Hann eitur Janus í Garði. Hann var 54 cm langur og vigaði 3950 gr.

8. november fingu Kaja Hansen og Jónstein Olsen, Toftum, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4200 gr.

10. november fingu Rúna Poulsen og Guttormur í Skála, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3350 gr.

10. november fingu Morid og Magni Mikkelsen, Søldarfirði, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3400 gr.

10. november fingu Edda Hjartvarsdóttir og Jan Poulsen, Tórshavn, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4950 gr.

10. november fingu Olga og Høgni Müller, Assiaat, Grønland, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 3650 gr.

11. november fingu Jónrit Nielsen og Erling Dalsgaard, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3965 gr.

11. november fingu Guðrið Hansen og Tummas E. Justinussen, Leirvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4300 gr.

11. november fingu Asbjørg Jacobsen, Tórshavn, og Eyðun Larsen, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3100 gr.

# Thorstein Arge

### f. 8. juni 1939 d. 5. oktober 2003




5. oktober 2003 andaðist Thorstein Arge, handilsmaður í Havn, 64 ára gamal. Thorstein var havnarmaður, sonur Oliviu, f. Augustinussen, ættað úr Vági, og Jákup Andreas Arge, úr Havn.

Hann fór fyrstu ferð til skips sum 16 ára gamal. Hann var útbúgvin stýrimaður og skipsførari og sigldi í Mærsk flotanum í mong ár.

Miðskeiðis í 80-unum gavst hann við at sigla úti og fekk sær arbeiði á landi.

Thorstein arbeiddi eina tíð við fiskavirkinum Saké í Hósvík. Hann var við til at byggja virkið upp og var stjóri har, til hann í 1988 yvirtók tubbakshandilin, Oscar F. Arge, á Kongabrúnni í Havn. Ella, einkjan eftir Oscar F. Arge, sum var farbróðir Thorstein, hevði tá rikið handilin síðan 1975. Handilin lat fyrstuferð upp á Ólavsøku í 1938.

Hann handlaði so á Kongabrúnni, til hann í august 2002 flutti niðan í Niels Finsensgøtu 31, har sum hattahandilin hjá Minu Wilhelm var fyrr.

Thorstein giftist við Marin, f. Christiansen, úr Mattalág í Havn. Tey settu búgv í Mattalág og fingu trý børn innan eitt ár, sonin Jákup Andreas (Dia), sum er føddur 1. november 1961 og tvíburadøturnar Sunnivu og Sólrun, sum eru føddar 28. oktober 1962.

Eftir at Thorstein legðist upp á land, brúkti hann nógv av síni frítíð til at prýða rundan um húsini.

# Erik Mørkøre

### f. 2. juni 1912 d. 8. februar 2003



Nú fjøllini eru gingin og flettingin er farin afturum, var tað so undarliga tómt at koma út á Selheygg, nú tá ið tú, abbi, ikki ert har longur. Tað var løgið at hugsa sær, at tær mongu hugnaligu løturnar úti hjá tær og ommu, har vit sótu í køkinum og prátaðu, nú ongantíð skuldu koma aftur.

Prátið í køkinum um flettingina, vekt, og ikki at gloyma hvussu veðrið mundi fara at verða, nú kjøtið skuldi heingjast upp, var mangan stuttligt at hoyra. Tó var tað ikki bert hetta prátið, sum hevði tín áhuga. Tú var eisini altíð áhugaður í, hvussu vit barnabørnini høvdu tað, hvat vit tókust við og á tín egna hátt fekst tú okkum eisini at hugsa um, hvat vit vildu við lívinum.

Títt lív var mangan strævið. Bert 11 ára gamal misti tú mammuna og mostur tína. Hetta vóru tvær kvinnur, sum fyltu nógv í tínum lívi, og sum vórðu tiknar frá tær við bert fáum tímum í millum og fóru í somu grøv. Eg minnist, at tú plagdi at fortelja, at tit systkini vórðu send hvør í sína ætt, eftir at mamman doyði. Tú fórt heim í Vág til Símun at búgva, og tú plagdi at siga, at Tunguhúsið heima í Vági var títt annað heim.

Tú plagdi at taka til, at tú og tey flestu, sum vóru tínir javnaldrar, høvdu ikki havt møguleika fyri at fara at lesa, men tú frøddist um, at tey ungu í dag høvdu betri møguleikar fyri at nema sær lærdóm. Tú hevði hinvegin lívsins lærdóm. 17 ára gamal fór tú til skips við Solo Deo Gloria. Tú fekst um endan av deyðssiglaratíðini og var við dammskipi og síðani við skonnart og øðrum skipum til tú fór upp á land í 1949.

Sum smádrongur í Tunguhúsinum heima í Vági, hevði tú óivað verið uppí, tá ið Símun í Vági bryggjaði. Tí eftir at tú legðist uppá land, fór tú at arbeiða á bryggjarínum hjá Einari Vaag. Eg minnist væl, hvussu forkunnugt tað var sum smágenta at koma at vitja teg og ommu á Selheyggi. Um høgtíðirnar bjóðaði tú sodavatn í alskyns litum, og vit børn máttu hugsa okkum væl um, áðrenn vit valdu, tí vit kundu bert velja eina. Tú plagdi at siga, at um vit ikki orkaðu at drekka alla sodavatnina, so skuldi tú goyma hana til vit komu aftur.

Tú fylgdi væl við í samfelagsviðurskiftum. Tú vart javnaðarmaður og mangan varð tosað um politikk. Tá prátað varð um javnstøðu segði tú so mangan, at hetta bara var eitt orð, og tú plagdi at taka til, at munur var á kvinnum og monnum. Tú helt, at sama um talan var um mann ella kvinnu, høvdu øll sína uppgávu í samfelagnum. Teimum sjúku og veiku, sum ikki kundu arbeiða í samfelagnum, skuldi landið taka sær av og so áttu øll onnur at arbeiða, bæði heima og úti. Tú plagdi at minna meg á, at lívið kundi laga seg soleiðis, at tað ikki altíð var, at man hevði eitt val.

Tín partur lá ikki eftir, tá tað ráddi um at arbeiða og eg minnist teg sum ein raskan og arbeiðssaman mann. Seinasti arbeiðsdagur tín á Føroya Bjór var tann dagin, ið tú fylti 80 ár.

Nú tú ert farin, minnist eg teg við takksemi og við gleði um tað, tú var fyri okkum øll og við ynski um, at friður skal vera við minni tínum.

**Birta Biskopstø**



NØVN Í VIKUNI
Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo


# Annlis Bjarkhamar læraraprógv

Mikudagin 5. november tók Annlis Bjarkhamar, fyrrverandi landsstýrismaður í mentamálum, læraraprógv á Føroya Læraraskúla.

Annlis er 29 ára gomul og ættað úr Vági. Hon byrjaði á Føroya Læraraskúla í 1997. Eftir 3 ára lesnað, tók Annlis farloyvi í eitt ár, har hon arbeiddi sum samskipari fyri Tjóðveldisflokkin.

Tá Annlis tók við starvinum sum landsstýriskvinna í juni 2002, var hon ikki heilt liðug við útbúgving sína, men eftir at hon fór úr landsstýrinum aftur, setti hon sær fyri at gera seg lidna við skúlagongdina. Við vælvild frá

Føroya Læraraskúla fekk hon flutt prówtøkur sínar til nú í heyst og hevur nú loksins fingið læraraprógv sítt.



*Pauli Nielsen, rektari á Føroya Læraraskúla, handar her Annlis Bjarkhamar, lærarapróvgið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# 300 ára gamal stórhvalageisli við Gjógv

*Pól Hans Jákup Debes við umleið 300 ára gamla stórhvalageislanum*



Á myndini her stendur gjáarmaðurin, Pól Hans Jákup Debes, sum býr í Skopun, við einum umleið 300 ára gomlum stórhvalageisla.

Geislin er av einum stórhvali, sum kom inn í Gjónna við Gjógv fyri umleið 300 árum síðan. Hvalurin slapp ikki út aftur, so har mátti alt fólkið í bygdini í sving fyri at fáa lívið av honum.

Tað varð sagt um ein húskall á Fløtti, nevndur Bartals Pætur, at tá hann stóð og spann, kastaði hann ongantíð villan frá sær, fyrr enn hann varð liðugur. Men hendan dagin, tá hann hoyrdi um hvalin í Gjónni, leyp hann avstað og oman í Gjónna.

Geislin er 30 cm í diametur og 20 cm tjúkkur.

Geilsin er í varðveitslu í Ólastovu, sum er bygd í 1907, áðrenn tað var hann í gomlu Ólastovu.

# Jógvan Johannesen

### f. 14. august. 1919 d. 26. oktober 2003



26. oktober andaðist Jógvan Johannesen í Havn 84 ára gamal. Jógvan var ættaður úr Hvalvík. Hann var yngstur av níggju systkjum.

Foreldrini vóru Billa Nicolina, f. Joensen, úr Fuglafirði, og Jógvan Johannesen, vanliga nevndur Jógvan á Lag, úr Hvalvík.

Hóast heimið í mangar mátar var fátæksligt, var gott samanhald í familjuni og systkini hjálptu hvør øðrum sera væl.

Sum ungur fór Jógvan til Havnar í timburlæru hjá Jóannes Steffansson, ið var giftur við systrini, Solinu. Jógvan búði hjá teimum á Boðanesi, og fekk hann gott í beinini har.

Liðugur við lærutíðina fór hann til Danmarkar á ein byggimeistaraskúla saman við øðrum kendum føroyingum.

Eftir lokna skúlagongd kom hann heim aftur til Føroya og byrjaði at arbeiða sum sjálvstøðugur byggimeistari. Eftir vanliga arbeiðstíð undirvísti hann á Tekniska Skúla í Havn. Frá 1949 til 1967 undirvísti hann bert um kvøldið, men í 1967 gjørdist hann lærari burturav, til hann fór frá fyri aldur í 1986.

Av álitisstørvum kann nevnast, at Jógvan var metingarmaður hjá Jarðarráðnum og hjá Føroya Sparikassa, har hann eitt tíðarskeið var formaður.

Síðst í 40-unum hitti hann Mariu Abrahamsen av Strondum, tey giftust í januar 1950 og fingu fimm børn, tey eru: Bjarki, f. í mars 1950, Ninna, f. í desember 1953, Ása, f. í august 1957, Torkil, f. í november 1960, og Jón, f. í apríl 1966.

Jógvan var væl kendur millum havnarfólk, hansara sereyðkenni var, at hann altíð var virkin. Hann var lítil og kvikur og hevði altíð nógvan skund. Hann var arbeiðssamur, lítillátin og hjálpsamur. Hann var ein trúgvandi maður, sum vísti stórt trúfesti. Í vertskapi var hann góður sangari og skipaði ofta fyri í føroyskum dansi.

Í sínum virkna arbeiðslívi hevði Jógvan ikki nógva tíð til familjuna, men tað gjørdi hann sanniliga nakað við, tá hann gavst at arbeiða. Hann vitjaði dúgliga børnini og abbabørnini.

Seinastu árini var Jógvan heilsuveikur og hevði trupulleikar við lungunum. Nú hann andaðist, var hann í Danmark saman við Mariu, har tey vitjaðu døturnar. Hann andaðist í Keypmannahavn. Jógvan var tann seinasti, sum var eftir av teimum nýggju systkjunum úr Hvalvík.

## Andlát

8. november
Hans Petur Weihe, advokatur, ættaður úr Søldarfirði búsitandi í Værløse, 66 ár
Hans Pauli Edmund Johannesen, ættaður úr Hvannasundi, búsitandi í Klaksvík,79 ár

10. november
Sørina Højsted, Nólsoy, 73 ár
Herjálvur Thomsen, Sandvík, 69 ár
Simona Vang, ættað úr Froðba búsitandi í Havn, 89 ár

11. november
Dia Gaardbo, Runavík,76 ár
Helga Mohr Poulsen, Tórshavn, ættað úr Vestmanna, búsitandi í Syðrugøtu, 84 ár
Alexandra Kristensen, fødd Joensen, ættað úr Skopun, andaðist á Bispebjerg hospitali, 90 ár

13. november
Súsanna Ennigará, Fuglafjørður, vanliga nevnd Sanna,72 ár.

## Dagurin

**15. november. Leopold,** deyður í 1136. Greivi í Eysturríki, sum varð skírdur halgimenni fyri mongu góðgerðir sínar og fyri tær kirkjur og kleystur hann læt byggja. Hann umkomst á eini veiðiferð.

Navnið kemur av týska orðinum fyri *fólk* og *djarvur*.

**16. november. Otenius.** Skrivað skeivt fyri hin halga Otmarus, sum var abbati í kleystrinum St. Gallen í Sveis og doyði í 759.

**17. november. Anianus,** deyður í 453. Var abbati í kleystrinum Orgerils, nærhendis Orleans, har hann seinni gjørdist biskupur.